

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 07 - 2012

# Kreppuútlit trýsta oljuprísin

Stori óttin fyri áhaldandi búskaparligum trupulleikum í evrulondunum gjørdi, at oljuprísurin fall á altjóða marknaðinum í dag. Prísurin á einari tunnu av Brent-norðsjóvarolju fall meiri enn fýra dollarar og kom niður 102,73 dollarar, og um somu tíð fall oljuprísurin í New York meiri enn 3,7 dollarar niður á 88,09 dollarar. Oljuprísurin hevur annars verið hækkandi ta seinastu tíðina orsakað av teirri ótryggu støðuni í Miðeystri. Hósdagin var hann tann hægsti í tveir mánaðir, men hann er fallin aftur síðani fríggjadagin. Virðisbrævavirðið hevur eisini verið minkandi allan dag, og orsøkin er sambært greinarum vandin fyri, at Spania fer at biðja um búskaparliga neyðhjálp.